Stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina **Tórshavn 22. november 2019**

Til
landsstýrismannin í umhvørvis-og vinnumálum

Uppskot um broytingar av inn-og útgjøldum

Inngangur
So hvørt sum virksemið í landinum er økt og arbeiðsloysið er minkað, eru fíggjarligu umstøðurnar hjá Arbeiðsloysisskipanini betraðar.

Skipanin hevur havt vaksandi avlop á hvørjum ári síðani 2014, og eginognin, sum kom niður á slakar 307 mió. kr. við árslok í 2013, fer væntandi upp um 900 mió. kr. við árslok í ár.

Fyri nøkrum árum síðani – í 2014 – varð skipanin stillað soleiðis, at langtíðarhaldførið varð tryggjað í tann mun, vit tá hildu vera rætt soleiðis, at um arbeiðsloysið í Føroyum var niðan fyri 4,25% til 4,5%, so skuldi raksturin av skipanini geva avlop, meðan skipanin kundi hava hall, um arbeiðsloysið fór upp um 4,5%.

Hesi mørkini á 4,25% til 4,50% vóru grundað á søguliga arbeiðsloysið árini frá 1998 til 2013 og var eitt miðaltal eftir, at arbeiðsloysið var leiðrættað fyri tíðarskeiðið, tá arbeiðsloysið var serliga høgt ella serliga lágt.

Síðani er miðalarbeiðsloysið síðan 1998 lækkað nakað, og hevur verið sløk 4% hesi 21 árini.

Hóast ALS-gjaldið hevur verið óbroytt 1,25% seinastu átta árini, eru samlaðu árligu inngjøldini vaksin við oman fyri hálvthundrað mió. krónum síðan 2014, og serliga hesin vøksturin hevur við sær, at arbeiðsloysið kann fara upp um áleið 5,5%, áðrenn raksturin hjá Arbeiðsloysisskipanini fer at geva hall.

Stýrið metir, at hetta – saman við tí, at eginognin væntandi fer upp um 900 mió. krónur við árslok í ár - ger, at fíggjarførið hjá skipanini nú er so mikið gott, at skipanin kan standa ímóti einum arbeiðsloysi á 8% í eini 12 samanhangandi ár og eitt arbeiðsloysi á 10% í eini 6 ár, áðrenn skipanin verður insolvent.

Broytingar
Stýrið heldur, at fíggjarliga treystið hjá skipanini er so mikið gott, og útlitini so fræg, at tað er búskaparliga ráðiligt at lækka inngjaldið við 0,25%-stigum niður á 1%, at hækka útgjaldsloftið úr 17.500 kr. um mánaðin upp í 18.500 kr. um mánaðin og at hækka útgjaldsprosentið úr 75% upp í 80% av útrokningargrundarlagnum.

Mett verður, at hesar broytingar fara at hava við sær, at inngjøldini í 2020 minka úr 255 mió. kr. niður í á leið 200 mió. kr. og at samlaðu útgjøldini hækka úr sløkum 58 mió. kr. upp í umleið 62 mió. kr.

Fyrivarni
Ilt er at spáa um framtíðina og stýrið tekur tí fyrivarni um at venda aftur við uppskoti um at hækka inngjøld og lækka útgjøld seinni, um arbeiðsloysið verður verandi høgt í longri tíð.

Lógteknisk fremjing av uppskotinum

Inngjøld
Broytingin av inngjaldinum verður framd við at gera hesa broyting í kunngerð nr. 136 um ALS-gjald, sum broytt við kunngerð nr. 165 frá 20. desember 2011:
§ 1 verður orðað soljóðandi:
"Tað í § 9, stk. 1 í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing nevnda ALS-gjald er 1,00%."

Útgjøld
Broyting av útgjøldum verður framd við at gera hesar broytingar í lógini um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing:
§ 16, stk. 1, 1. pkt. verður orðað soljóðandi:
"Arbeiðsloysisstuðul pr. dag er 80% av tí í § 15 nevnda úrokningargrundarlagi, býtt við 253."

§ 16 stk. 2, 1. pkt. Verður orðað soljóðandi:
"Árligi arbeiðsloysisstuðulin er í mesta lagi kr. 222.000."

Vegna stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina

Eyðfinnur Jacobsen
formaður